# Sandoyggin er lívfiskaøki

**Tá tað er felt í samgonguskjalið, at Sandoyggin er lívfiskaøki, og verður virkað fyri at menna oynna sum slíka, so kann tað illa merka annað en, at kynsbótararbeiðið við toskur verður framt har, heldur Gerhard Lognberg**

POLITIKKUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Hvør er ætlanin við lívfiskastøðini í Skopun? Er hon partur av útbyggingarætlanunum hjá P/F Fiskaaling? Og nær kann væntast, at aling av toski verður veruleiki?



*Gerhard Lognberg, løgtingsmaður, heldur, at lívfiskastøðin í Skopun verður tað staðið, har kynsbótararbeiðið við toski verður framt*

Hesar spurningar fer Gerhard Lognberg at seta Bjarna Djurholm, landsstýrismanni á tingfundinum í morgin, tá munnligir fyrispurningar eru á skránni.

Gerhard Lognberg sigur í viðmerking, at tað liggur á ljóði, at Pf. Fiskaaling ger klárt at fara undir toskaaling.

– Hetta er at fegnast um, tí toskaaling kundi við tíðini ført nógvar inntøkur við sær til landið. Lívfiskastøðin í Skopun hevur havt ein sera virknan leiklut í alingini í Føroyum. Tí tykist tað heldur løgið, at lívfiskastøðin í Skopun ikki verður nevnd, tá ført verður fram, at toskaaling verður eitt høvuðsøki hjá Pf. Fiskaaling, sigur Gerhard Lognberg.

Hann heldur, at Lívfiskastøðin í Skopun hevur virkað væl øll árini og hevur verið eitt týdningarmikið íkast til føroyska aling. Harafturat hevur lívfiskastøðin havt stóran týdning sum arbeiðspláss í einum øki, har ikki ov mikið av arbeiði er framm-anundan.

Gerhard Lognberg vísir eisini á, at í samgonguskjalinum stendur, at »Sandoyggin er lívfiskaøki, og verður virkað fyri at menna oynna sum slíka. Virksemið við Áir heldur fram.«

– Hetta kann illa merkja annað, enn at lívfiskastøðin í Skopun verður tað staðið, har kynsbótararbeiðið við toski verður framt, heldur Gerhard Lognberg.

## Gallakonsert við Kristel og Jens Lisberg í Mentanarhúsinum



GALLAKONSERT

*Tíðindaskriv*

Gallakonsert verður í Mentanarhúsinum leygarkvøldið 11. februar kl. 20.00 við Kristel og Jens Lisberg. Tey bæði hava lagt seg eftir at gera eina fjøltáttaða skrá, og tí verður nógv ymiskt at hoyra. Tó er høvuðsdenturin lagdur á tónleik, sum er á uppsamlingsfløguni hjá Jens, sum kom út undan jólum. Kristel er kend við sínari serligu vøkru og kraftfullu rødd. Hon syngur einstakir sangir saman við Jens og syngur eisini sjálv nøkur løg.

Harumframt fer Jens at syngja nøkur løg saman við Bergi Godtfred.

Fleiri av okkara bestu tónleikarum eru við í orkestrinum hjá Jens og Kristel. Hesi eru: Ólavur Øster, guitar, Kolbein Simonsen, bass, Petur Hermansen, steelguitar, Jonleif Jensen, trummur, Jákup Zachariasrn, dopro guitar, Gunnar Guttesen, tangentar. Harumframt syngja Maria Husgarð, Mallan Hansen, Sigga Hansen og Barbara á Tjaldrafløtti kór.

**Atgongumerki**

Atgongumerkir fáast í forsølu á hesum støðum:
Kunningarstovan í Fuglafirði
Kunningarstovan í Runavík
Kunningarstovan í Havn
Shellstøðin við Oyrarbakka
Statoil í Skálabotni

# Tigandi meirilutin talar

**Komandi leygardag klokkan 14 verður ein sonevndur »fólkafagnaður fyri fjølbroytni í Føroyum«**

FAGNAÐARGONGA

– Ert tú ein av teimum mongu, sum halda seg hoyra til tigandi meirilutan? So er stundin kanska komin at ressast við og taka lut í fólkafagnaðinum fyri fjølbroytni í Føroyum. At vit eru eitt fólk merkir ikki, at vit eru eins fólk. Føroyar eru fyri øll, og tað er snøgt sagt frálíkt, at vit eru so ymisk!

Soleiðis siga fyrireikararnir av fagnaðargonguni, sum verður í Havn leygardagin.

Fyrireikararnir bjóða øllum at koma – og at taka familju og børn við í Sjónleikarhúsið leygardagin 4. februar kl. 14. Haðan fer fagnaðargonga oman á Vaglið at hálova tolsemi, virðing og fjølbroytni. Á skránni er tónleikur, sjónleikur, røða, sangur og vermandi salsarútma í vetrarkuldanum:

Skrá fyri tiltakið er hendan:

- Savnast við Sjónleikarhúsið klokkan 14
- Gongan fer oman eftir Niels Finsens gøtu við tónleikarum, bannarum og gyklarum á odda
- Við Steinatún verður steðgað. Við slagorðunum »Píka! Tit eru ikki øll líka« fer maður, sum hevur skil fyri menniskjaligum frábrigdum, at skilja gánandi gonguna sundur
- Gongan heldur lýðin leiðina fram oman á Vaglið, har hildið verður fram við hesi dagsskrá:
- Háfloygdur einglaleikur.
- Salsastúvningur í rútmugrýtu (fólk verða stúvað saman og hitað upp við roðandi karibiskum rútmum)
- Klók kona sigur nøkur kærleiksfull orð.
- Talukór
- Felags sangur

Aftaná fara øll tuskandi yvir í Tórsgøtu, ið er umbroytt til Tónleikagøtu:

- Á Margarinfabrikkini eru sangir og søgur til børn.
- Á Meiarínum ræður rokkurin.
- Í Miðlahúsinum eru trubadurar og fólkatónleikur.

## Sirri á stórari sølumessu

FRAMSÝNING

Formland er størsta yrkismessa innan brúkslist og sniðgeving í Norðurlondum. Messan hevur verið hildin tvær ferðir um árið síðan 1984 í størsta messu- og framsýningshúsi í Norðurlondum, Messecenter Herning. Formland er ein avlokað yrkismessa, har bert atgongd er fyri tey, ið eru mvg. skrásett.

Áleið 20.000 innkeyparar úr fleiri enn 40 londum í heiminum koma hagar at finna sær hugskot og íblástur til komandi árstíðir. Sostatt hittast fleiri enn 7.000 handlar á tí trøllabundna handilsmekkaðinum.

3.-6. februar fer Sirri at luttaka á Formland við egnum bási.

Fá meir at vita á: www.messecenter.dk - www.sirri.fo



# Vitjan í Norðoyatunlinum

**Verkætlanarfelagið vitjar størsta byggipláss í Føroyum nakrantíð –Norðoyatunnilin**

VERKÆTLANARFELAG

Hósdagin 09.02.2005, kl. 15.00 vitjar felagið Føroysk verkætlanarleiðsla Norðoyatunnilin. Umframt at hyggja at, hvussu tað gongur við sjálvum arbeiðinum, ið umfatar tunnilin við øllum tekniskum installatiónum og vegagerð í Klaksvík og Leirvík, fer verkætlanarleiðarin fyri Norðoyatunnilin at greiða frá, hvussu projekti er skipað.

Tosað verður millum annað um:

Hvussu hevur eigarin av tunnlinum valt at skipað felagið og arbeiðið við at byggja og reka tunnilin?

Hvat er serligt við stórum verkætlanum, býti í arbeiðstøkur, stýring av arbeiðstøkum og tann samleiða fíggjarstýringin?

Útbjóðingarhættir og sáttmálasløg, ið eru brúkt til ymisku arbeiðstøkurnar.

Verður nakað serligt gjørt fyri, at arbeiðið verður gjørt liðugt áðrenn avtalaðu tíðina?

Hvussu hevur Norðoyatunnilin valt at skipa byggileiðsluna á staðnum?

Av tí at arbeitt verður í nógvum støðum í tunnlinum samstundis, stendst ampi av at fólk vitja, tí er bert pláss fyri teimum fyrstu 30 liminum, ið melda seg til vitjanina.

Vitjanin fer at taka umleið 2 tímar.



Tilmelding kann fara fram við at senda ein teldupost til hesa adressu HYPERLINK ”mailto:fvl@post.olivant.fo” fvl@post.olivant.fo

Luttakaragjald er 100,00 kr.